# Ein røð av óhepnum umstøðum

**- Slíkt er keðiligt, men eg havi fult álit á teimum, sum manna flúgvaran og teimum, sum standa fyri tí tekniska røktini, sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi**

ATLANTSFLOG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Sjálvandi órógvar tað fólk, tá ið vit fáa tvey líknandi tekniskt brek í eina lítla viku. Men eg eri sannførdur um, at her er talan um eina røð av serstakliga óhepnum umstøðum, sum hevur rakt okkum upp á nakrar fáar dagar.

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, hevur fult álit á, at tað er ikki ein svíkur í teknisku deildini hjá Atlantsflogi, sum hevur ført til, at sami flúgvari fyri aður ferð í gjárkvøldið mátti til Bergen at trygdarlenda, tí at brek var í luftbremsuskipanini.

– Okkara flogfør verða røkt eftir forskriftunum og betri enn tað og tí er tað stak óheppið, at slíkt kemur fyri. Men eg eri sannførdur um, at tað hevur onki við røktina at gera. Hetta er rætt og slætt eitt keðiligt óhapp, sum nú hevur rakt okkum tvær ferðir í eina lítla viku, har tað annars vanliga eru nógv ár ímillum slíkar hendingar

Men fyri at tryggja okkum til fulnar, senda vit nú flúgvaran til Svøríki, har luftbremsuskipanin verður tikin í botn, so at trupulleikin kann loysast einaferð fyri allar.

Annars hevur stjórin í Atlantsflogi eisini hug at taka tað positiva burturúr hendingini og tað er, at eins og leygardagin, fær manningin, sum var við í gjárkvøldið, sera góð skoðsmál frá ferðafólkunum.

– Tað er jugaligt at vita, at tað er dygd arbeiðnum, sum manningin stendur fyri, eisini tá ið serligar støður taka seg upp.

Eftir hendingina leygardagin, tá ið fúgvarin mátti til Bergen, varð tað ein ferðamaður, sum helt, at manningin átti at fingið tilboð um kreppuhjálp, tá ið tey komu í land.

Hetta er ein atfinning, sum Atlantsflog tók til sín og tá ið ferðafólkið kom í Vágar, stóð sálarfrøðingur fyri teimum, skuldi onki havt brúk fyri at tosa við hann.

Tað var ongin, sum tók av.

Eitt, sum fólk finnast at í gjárkvøldið, er, at fólk, sum komu at taka ímóti ferðafólki, onki fingu at vita.

Men hesum er Magni Arge ikki samdur í.

– Eg havi fingið at vita, at fólk fingu at vita, at flogfarið mátti til Bergen av tekniskum áðum. Tey, sum onki hava fingið at vita, hava so onkusvegna ikki hoyrt boðini, leggur hann afturat. Men onkur vildi kanska hava fleiri upplýsingar, men tað hevði starvsfólkið so ikki.



# Hava onki at havt at fýlast á hjá Atlantsflogi

**- Vit eru undir støðugum eftirliti og var tað tekniska støðið ikki fult nøktandi, slapp Atlantsflog ikki at flúgva, sigur Remi Hansen, tekniskur leiðari**

ATLANTSFLOG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Var tekniska støði hjá Atlantsflogi ikki fult út nøktandi, slapp felagið ikki at flúgva.

– So einfalt er tað, sigur Remi Hansen, tekniskur leiðari hjá Atlantsflogi.

Nú sami flúgvari hjá Atlantsflogi tvær ferðir í fimm dagar hevur verið noyddur at fara til Bergen at trygdarlenda fyri tekniskt brek, eru leysasøgur farnar at ganga um, at tekniska støðið hjá føroyska flogfelagnum ikki er á nøktandi støði.

Men tað avsannar tekniski leiðarin, Remi Hansen.

Hann staðfestir, at flúgvararnir hjá Atlantsflogi verða til fulnar røktir eftir forskriftunum hjá framleiðaranum.

– Men fyri alla tíðina at vera eitt stig frammanfyri, hava vit eisini eina skipan, har vit hava betri eftirlit við ávísum pørtum í flogfarinum enn tað, sum framleiðarin ásetir.




*Bjargingarlið stóðu til reiðar, tá ið Atlantsflog trygdarlendi í Bergen í gjárkvøldið, men alt gekk upp á stás, so teimum var ikki brúk fyri*

**Atlantsflog undir støðugum eftirliti**

Tekniski leiðarin vísir eisini á, at Statens Luftfartsvæsen, sum er ein óheftur, almennur eftirlitsmyndugleiki undir statinum, hevur eisini støðugt eftirlit við Atlantsflogi, akkurát, sum felagsskapurin hevur eftirlit við øllum øðrum flogfeløgum í ríkinum.

– Umboð fyri Statens Luftartsvæsen eru hjá Atlantsflogi tvær ferðir um árið og her felagið verður gjøgnumgingið.

– Umframt at kanna mannagongdir og skipanir, kannar Statens Luftfartsvæsen eisini tey einstøku flogførini beinleiðis.

Men her hevur onki verið at finnast at.

– Og so seint sum týsdagin kannaði umboð fyri Statens Luftfartsvæsen akkurát hendan flúgvaran, sum mátti til Bergen at trygdarlenda í gjárkvøldið og heldur ikki har var nakað at finnast at.

Men Remi Hansen staðfestir, at ein flúgvari er ikki øðrvísi enn allur annar teknikkur: Tað henda brek viðhvørt.

– Men var tekniska eftirlitið hjá Atlantsflogi ikki á høgum støði, sluppu vit rætt og slætt ikki at flúgva, leggur hann afturat.

Í Atlantsflogi vita tey væl, hvussu stóran týdning álit millum manna hevur og tí verður ikki slakað á hesum øki.

Annars sigur hann, at tað er ómøguligt at siga, akkurát, hvat tað er fyri ólag, sum kom á hendan flúgvaran, sum mátti til Bergen í gjárkvøldið.

Tí ber heldur ikki til, at siga, um tað er akkurát sama brek í luftbremsunum, sum spøkir aftur, ella um talan er um eitt annað brek.

Men fyri at binda um heilan fingur, hevur Atlantsflog gjørt av at senda flúgvaran til tekniska samstarvsfelagan Malmø Aviation í Svøríki.

Hagar skuldi flúgvarin eftir ætlan fara seinnapartin í dag.

– Í Svøríki er ætlanin er gera tað eftirlitið, sum annars vanliga verður gjørt einaferð um árið og ein partur av tí verður so at taka luftbremsuskipanina í botn fyri at tryggja, at alt nú er í lagi.

– Men at brek er í luftbremsunum, er ikki eitt ókent fyribrigdi. Tað er bara sjáldan, at nakað hoyrist um tað, tí tað er ikki so dramatiskt, sigur Remi Hansen.